solorka

# Heystsetur




## Generel kunning

sólorka



# Eitt eldorado av hugna og upplivingum




Heystsetan er ein av klassisku setum okkara við hópin av upplivingum í tí góða veðurlagnum. Umframt at sóla tykkum og annars taka tykkum av løttum, ber um dagin til at gera fimleik, at ganga vakrar túrar og at koma við á eina ella fleiri av vøkru og áhugaverdu útferðum okkara. Klokkan 18 hittast vit øll á Vaglinum, og hvørt kvøld ber til at dansa í Sólorkuklubbanum. Meira um tað á næstu síðunum





sólorka







# Vakrar og spennandi útferðir







sólorka






# Gaman og álvara – framløgur, prát, sangur og undirhald



Klokkan 18 hittast vit øll á vaglinum at lurta eftir framløgum, samrøðum, undirhaldi og livandi tónleiki og at syngja saman afturvið onkrum góðum úr ókeypis kafé okkara.

Hilmar Jan dirigerar bæði felagssanginum og látrinum. So her er einki annað at gera enn at spenna trygdarbeltið, tá hann fer í sving sum bæði toftamaður, prestur, politikkari og tað, sum verri er.



sólorka






# Frálíkir føroyskir og lokalir dansibólkar



Hvørt kvøld ber til at dansa í Sólorku-klubbanum undir stjørnuklára himmalinum – altíð aftur við livandi tónleiki frá føroyskum stjørnubólkum umframt lokalu bólkunum okkara.





# Albir Garden Resort

Mitt í lítla hugnaliga býnum Albir hava vit 50.000 fermetrar av føroyskum grannalagi. Her kanst tú gista í nýumvældum kømrum ella góðum íbúðum. Umframt svimjihyljarnar hava vit okkara egna vatnland, og tú kanst sjálvandi brúka bæði venjingarrúmið og hitarúmið.

Tað er eisini her í tí stóra urtagarðinum, at tú kanst njóta allar løturnar á Vaglinum og í Klubbanum umframt at gera fimleik og aðrar rørslur á Vøllinum

Hiðani tekur tað bert einar 15 minuttir at spáka oman á strondina gjøgnum miðbýin fram við nógvum matstovum, kaféum og krambúðum.







www.albirgardenresort.com



**HEYSTSETAN FEVNIR UM**

- **Beinleiðis flúgving við mati umborð og busskoyring t/r**
- **Gisting í 13 nætur**
- **Fulla pensjón v/drykkjuvørum**
- **Føroyskar vertir, hjálparfólk og lækna**
- **Fimleik, dans og aðra rørslu**
- **Reseptión á Vaglinum við ókeypis kafé og spennandi skrá hvønn dag klokkan 18**
- **Kvøldarhugna og dans við livandi tónleiki**
- **Høvi at tekna teg til nógvar áhugaverdar útferðir fyri lagalig eykagjøld.**

**solorka@solorka.com • tlf. 221090**